*Lars Ole Boldreel, jarðfrøðingur á DGU:*

# Spentur at síggja hvat er undir basaltinum



*Lars Ole Boldreel arbeiðis vanliga á DGU, men hann er eins spentur og føroyingar um seismisku kanningarnar.*

Í fleiri ár hevur verið tætt samarbeiði millum føroyska jarðfrøðissavnið og danska jarðfrøðisstovnin DGU. Ein liður í hesam samarbeiði er, at fólk frá DGU við jøvnum millumbili eru í Føroyum og arbeiða við uppgávum her. Best kend av hesum fólkum eru helst Morten Sparre Andersen og Steffan Hultberg.

Nú meðan umboð fyri oljuumsitingina herfyri vóru á kunningaferð í New Foundlandi og aðrastaðni við starvaðist Lars Ole Boldreel, jarðfrøðingur á stovninum.

Sosialurin tosaði við hann, áðrenn hann fór aftur til Danmarkar. Hann hevur serliga arbeitt við seismiskum uppgávum og hevur verið við í einum aljtóða projekti, sum kallast "Ocean Drilling Projekt". Talan er um eitt boriskip, sum ger kanningar kring allan heim. Teir hava borað djúpasta holið nakrantíð á jørðini. Tað er 2000 metrar undir havbotninum. Haraftrat hevur hann verið við seismiska skipinum Pelagia, sum hevur gjørt kanningar við Føroyar. Hesar kanningar snúgva seg um havbotnin og undirgrundina við Føroyar.

## Spentur

Lars Ole Boldreel er sera spentur um, hvussu fer at gangast við teimum seismisku kanningunum við Føroyar. Hann kennir sjálvur tær flestu kanningarnar, sum longu eru gjørdar. Eitt nú tær Western gjørdi í 1978. Lars Ole sigur, at tað verður spennadi at síggja, hvussu fer at ganga at sleppa niður gjøgnum basaltløgini við tí nýggjastu tøknifrøðini. Í kanningum, sum eru gjørdar higartil, hevur tað ikki eydnast koma niður gjøgnum basaltløgini. Nú hetta verður roynt av álvara fyri fyrstu ferð verður spennandi at síggja úrslitini.

Á DGU finst annars meginparturin av tí vitan, sum seismiskar kanningar gjørdar við Føroyar, hava givið. DGU hevur í seinastuni fingið so framkomna telduútgerð, at tað hevur eydnast at fáa eina rættiliga nýggja mynd av pørtum av føroysku undirgrundini burtur úr gomlum seismiskum kanningum, eitt nú teimum hjá Western frá 1978. Í løtuni skrivar ein danskur kvinnuligur jarðfrøðingur doktararitgerð nettup út frá hesum kanningum. Sum Sosialurin skilur tað fer hon í ritgerðini at kunna siga nakað um, antin løgini, sum eru bretsku megin miðlinjuna millum Føroyar og Hetland, eisini eru føroysku megin.

Lars Ole Boldreel sigur, at seismisku kanningarnar, sum nú skulu gerast við Føroyar, hava ikki bert áhuga fyri oljufólk. Tær hava eisini sera stóran týdning fyri tað vísindaliga arbeiðið hjá jarðfrøðingum, eitt nú fyri at skilja alla jarðfrøðina her um leiðir betri.

Tí er hann eisini sera fegin um, at kanningar eisini verða gjørdar í Lopra. Annars heldur danski jarðfrøðingurin, at fyrireikingarnar í Føroyum í sambandi við oljukanningar, hava verið sera professionellar.

-Her er gjørt eitt gott arbeiði.

jan



*Her í gomlu bátahøllini á Debesartrøð húsast føroyska oljuumsitingin. Mynd kalmar*

*Tíðindaskriv frá Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag:*

# Fundur um politisku støðuna

Nú val er í hondum skipar Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag fyri politiskum fundi hósdagin 26. mai 1994 kl. 19.30 á Landsbókasavninum undir heitinum »Politiska støðan«. Helena Dam á Neystabø, løgtingsmaður, greiðir frá, og politiskt orðaskifti verður.

Nývalið er útskrivað, og Føroya fólk skal aftur á val.

Á hesum vali fer fólkið at endurreisa álitið á Løgtingið og sýna vilja til at taka fulla ábyrgd av landi og fólki.

Maktasloysi verandi Løgtings verður í hesum døgum avdúkað í øllum teimum ógrundaðu og útspillandi álopum, serliga frá javnaðarflokkin, á sjálvstýrisflokkin og leiðslu floksins um politiskt taktiskt spæl.

Sjálvstýrisflokkurin ásannaði, at arbeiðsføri løgtingsins var ikki nóg gott, nú samgongan ikki longur hevði ein meiriluta aftan fyri seg, og sera avgerandi og truplar samráðingar standa fyri framman, og mælti flokkurin tí til at skriva út nýval sum skjótast.

Hetta var ikki politiskur taktikkur – tvørturímóti. Hetta var virðing fyri rætti fólksins til at tala.

**Blindastovnur Føroya**
hevur opið mándag–fríggjadag kl. 9–16.
Telefonir: 18222 og 19288.

**HD – 1. PARTUR Í FØROYUM**

Treytað av nóg stórari luttøku verður í heyst aftur farið undir HD 1. part.

HD 1. partur er ein grundleggjandi ástøðilig innføring í lærugreinirnar vinnubúskap, samfelagsbúskap, hagfrøði, vinnulívsrætt og teld.

Til at fara undir HD-lestur krevst í fyrsta lagi ein av hesum fortreytum, sum skulu skjalprógvast:

Hægri handilsskúla-, Students-, HF- og HT-prógv ella hægri útbúgving. Eisini eru ávís onnur krøv galdandi í enskum, støddfrøði og roknskaparlæru. Skúlin kann greiða frá hesum.

Nú ber eisini til at lesa HD 1. part sum stakgreinalestur, eina ella tvær lærugreinir um árið.

Til ber eisini at lesa onkra einstaka lærugrein, sum tú kanska hevur brúk fyri í sambandi við arbeiðið.

Undirvíst verður mánakvøld og mikukvøld frá kl. 17.45–21.00.

Prívtøka verður í mai/juni 1996.

Luttøkugjaldið er kr. 2.000,00 fyri hvørja lestrarhálvu ella 4.000,00 kr. um árið. Stakgreinalestur hevur onnur gjøld.

Ringið á skúlan 17177 mánadag–hósdag millum kl. 8.00 og 16.00, fríggjadag millum kl. 8.00–13.00 og biðið um upplýsingartilfar og innskrivingarseðil.

Eru tygum í iva um okkurt við HD 1. parti ber eisini til at ringja til skúlan.

Umsóknarfreistin er til 22. juni.

Skúlin við nøgvu møguleikunum!

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Marknagilsvegur 77 - Postsmoga 177
110 Tórshavn - Tlf. 17177 - Fax. 13374